

*Offurlomb: Høgni Hoydal, Jørgen Niclasen og Ann-Lis Bjarkhamar fáa ótakksomu lønina fyri stríð teirra*

Ólavsøkukabarettin 2003:

# Stuttligari enn speisk

**Tað eru orðini stuttlig og sjarmerandi heldur enn speisk satira, ið koma til hugs eftir Ólavsøkukabarettina – men fer var á, og hálvur annar tími gekk skjótt saman við teimum seks leikarunum og fýra tónleikarunum, ið førdu kabarettina í Sjónleikarhúsinum**

UMMÆLI
*Marjun Dalsgaard*

Ein eiðismaður situr á einum steini og syngur um, at hann fór á fjall og fyltið skjáttuna — teksturin er ikki so galin, men stuttligari eru tveir fittir syngjandi seyðir aftan fyri hann.

Somuleiðis verður ILA handfarið eitt sindur for lætt, men elegant við at tríggir laksar syngja "Til Havnar vit fara (...) trihaldiriiILA".

Tað, sum eyðkennir Ólavsøkukabarettina 2003, er, at tað er komiska talentið hjá leikarunum, sjarma og góður tónleikur, ið ber hana heldur enn satiriskt bit. Ongar analysur av politiska spælinum liggja aftanfyri skettjurnar, og tær eru sostatt skettjur heldur enn samfelagsviðmerkingar. Vit vera mint á nógv, sum er hent í árinum, men einki kemur aftrat sum so.

Samanspælið við tónleikararnar, við Trónda Bogasyni á odda, gjørdi Ólavsøkukabarettina til eina góða uppliving, og tíðin tóktist aldrin long, hóast kabarettin vardi í hálvan annan tíma.




*Eitt afturvendandi evni í Ólavsøkukabarettini er Burger King – tað er komiska talentið hjá leikarunum heldur enn innihaldið, ið ber skettjuna*

### Kvinnuleys kabarett

Hóast ongar kvinnur eru at síggja millum leikararnar í ár, skortar ikki við kvinnuligum leiklutum – og tað er sum verða mann ein tryggur sigur (kanska eitt sindur bíligur eisini) at mannfólk upptraðka í konufólkabúnum. Byrjanin á kabarettini er somuleiðis í hesum stíli - tó uttan at vera ein løtt og bílig loysn – men meira um hetta skal ikki avdúkast nú.

Eitt annað úrslit av manglandi kvinnuligum leikararum/rithøvundum til skettjurnar var kanska, at einar ella tvær í so sjarmerandi fúlheitir sluppu sær uppí – og fullu síðan til jarðar – tí øll flenna ikki, bara tí tey hoyra orðið "Lisa".

Tá tað er sagt, eigur eisini at verða viðmerkt, at undirritaða varð send til kabarettina fyri Sosialin vegna sítt kyn – so allar antikvinnuskettjur kundu avdúkast, eins og tað skuldi gerast greitt, um úrslitið av venjingini hjá teimum seks garpunum var ein kabarett full av "mannfólkahørmi" skilað til mannfólk aleina – til tað kann bert sigast: Nei, tað er hon ikki.

### Frá Sadam til Guðrun Sólju

Kabarettin kemur væl rundan um persónar og viðurskiftið, sum hava litað samfelagið seinasta árið, og eingin er friðaður. Í lættara endanum av skettjunum keypir Guðrun Sólja ein burgara í Burger King – tað frægasta, sum kann sigast um akkurát hesa skettjuna, er, at Esben Hallurson Jacobsen syngur sera væl. Annars verða vit mint á langar fingrar, klændrivættir og pínligar støður í tinginum. Fakfelagskvinnur enda í geglinum, Helgi Jacobsen frá Útvarpi Føroya fær sín egna heilivág at smakka, og SVF fær mangt eitt priki. Men Føroyar verða eisini sæddar uttanífrá, og tað er sjálvsagt av einum amerikanskum serfrøðingi, ið kemur til áhugaverdar niðurstøður um grind-etandi skapningin, eins og Sadam Hussain fær síni sjónarmið fram í Sjónvarpi Føroya.

### Royndir leikarar

Kabarettin er framførd við góðum spælið, væluppløgdum leikarum og vælvandum skettjum. Pætur Dahl megnar at líkjast Høgna Hoydal, men annars er tað ikki at eftirlíka persónum, sum leikararnir gera best. Tó hava teir allir góða útstráling á pallinum og serliga Esben Hallurson Jacobsen hevur stórt komiskt talent. Kjartan Lundgren hevur eina sjarmu sum røkkur oman til aftastu røð og aftur og er framúr sum amerikanskur granskari, men hann átti kanska ikki at sungi so nógv. Gutti Winther er somuleiðis fullur av megi á pallinum og Turpin Napoleon Djurhuus kann flyta nógv við sínum andlits- og eygnabráði. Saman við honum er Finnur Jensen nokk tann, ið kann geva sínum karakterum eina serliga fittliga, eitt sindur løgna, persónligheit.

Allir leikararnir, sum eru við í Ólavsøkukabarettini í ár, hava roynt seg á palli áður – eisini í kabaretthøpi. Hóast tað ikki er tann djúpa samfelagsanalysan, sum er komin burturúr, er tað ikki ein burturspilt løta, um tú leitar tær niðan í Sjónleikarahúsið til Ólavsøkukabarettina 2003. Tvørturímóti hálvur annar stuttligur tími.

**Manning Ólavsøkukabarettin 2003**

Leikarar:
Esben Hallurson Jacobsen
Kjartan Lundgren
Turpin Napoleon Djurhuus
Pætur Dahl
Gutti Winther
Finnur Jensen

Tónleikarar:
Tróndur Bogason
Heðin Ziska Davidsen
Mikeal Blak
Høgni Lisberg



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Jógvan Durhuus sæti á tingi



*Høgni Hoydal, landsstýrismaður, heilsar Jógvani Durhuus vælkomnum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Ólavsøkudag tók Jógvan Durhuus í Vestmanna sæti í tingi fyri Nikláa Petersen, tingmann Tjóðveldisfloksins, sum er í farloyvi. Jógvan er næstvaldi á listanum hjá Tjóðveldisflokkinum í Norðurstreymoy. Hann sat á Løgtingið fyri Tjóveldisflokkin frá 1970-1980, frá 1984-1990, burtursæð frá skeiðnum sum landsstýrismaður, og frá 1994-2002. Hann var landstýrismaður og varaløgmaður frá 1985-1989. Jógvan er giftur við Hervør Hanusardóttir, f. við Høgadalsá, úr Havn. Hann var postavgreiðslumaður í Vestmanna í eini 40 ár. Í dag arbeiðir hann á høvuðsdeildini hjá Postverk-inum á Óðinshædd í Havn.

## Eyðálvur Vang 50 ár



Mikudagin fylti Eyðálvur Vang í Klaksvík 50 ár. Hann er sonur Valborg og Ásbjørn Vang og er giftur Estrid Millum Garðarnar. Estrid og Eyðálvur eiga børnini, Finnbjørn, Lisbeth og Hera.

Eyðálvur er skipari á útróðrarbátinum, Kallanesi.

## Jensina Bolstad 50 ár



Ólavsøkudag 29. juli fylti Jensina Bolstad í Havn 50. Jensina er fødd og uppvaksin í Sandvík, dóttir Hildu, f. Kjærbo, og Jens Bolstad. Hon lærdi til bankaassistent í Sjóvinnubankanum í Havn. Seinni tók útbúgving sum blómuprýðari í Danmark. Hon arbeiddi í nøkur ár í blómuhandlinum hjá Trónd Hansen á Áarvegnum. Seinnu árini hevur hon arbeitt sum stuðul hjá børnum við serligum tørvi. Jensina hevur sera stóran áhuga fyri fuglum og blómum. Hon er gift við Jóhan Mortensen, sum er sonur Miu, f. Olsen, og Axel Mortensen í Havn. Tey eiga børnini Jens Hera og Guðrun.

## Dagurin

**31. juli. Germanus,** deyður í umleið 448. Føddur í Auxerre í Fraklandi. Var løgfrøðingur og fekk høgt starv sum embætismaður, men varð 40 ára gamal ímóti vilja sínum valdur til biskup í Auxerre. Hann doyði í Ravenna í Italiu.


# Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran …**

Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.



Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:...............................................................................................
Bústaður:..........................................................................................
Bygd/býur:...........................................................Tel:.................................
Evt. arbeiðspláss:.............................................................................

Merkisdagurin er: ..............................................................................

Innsendari: ...................................................................Tel:.............................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 311820/216135, fax 314720, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 458686, fax 458687, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 447820, fax 449520, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 375364, fax 375464, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 333820, fax 333720, teldupost: edvard@sosialurin.fo